# r presendingar til vinnuna



*- Vit hava onkuntíð verið fleiri enn tveir mans í arbeiði, men noyðast at laga arbeiðsorkuna eftir tí, sum er at gera, sigur Torbjørn Gaard, sum eigur og rekur Seglvirkið í Klaksvík*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

tjúktum, og vevnaður er eisini ymiskur – alt eftir, hvat dúkurin skal nýtast til, sigur Torbjørn.

Hann leggur aftrat, at kunsttilfarið hevur verið á marknaðinum í nógv ár, og hann heldur, at tað loysti gamla dúkin av einaferð í fimti-ella sekstiárunum.

- So, vit báðir, sum arbeiða her í dag, hava ongantíð arbeitt við tí gamla tilfarinum, sigur Torbjørn.

Hann vísir á, at sum við øllum øðrum í samfelagnum, er eisini meira og minni at gera á Seglvirkinum.

- Vit hava onkuntíð verið fleiri enn tveir mans í arbeiði, men noyðast at laga arbeiðsorkuna eftir tí, sum er at gera.

Torbjørn sigur, at hann onkuntíð hevur havt yngri kreftir í arbeiði, sum teir hava lært upp til at taka sær av tí, sum Seglvirkið ger.

- Hesir eru við tíðini farnir í læru aðrastaðni ella eru farnir at royna okkurt annað, leggur hann aftrat.

## Maskinurnar

Torbjørn sigur, at tann elsta seymimaskinan, sum hann goymir á virkinum, var ikki el-drivin.

- Her noyddist tú at traðka á pedalar fyri at fáa hana at seyma. Seinni varð ein elmotorur settur í hana.

Hann sigur, at hendan maskinan, sum er elligomul, sjálvsagt ikki verður brúkt í framleiðsluni longur.

- Tær maskinurnar, vit brúka í dag, eru ikki so øgiliga gamlar, men tær eru heldur ikki nýggjar. Tann elsta, haldi eg, er frá 1972 og ein onnur er frá 1969. Tann nýggjasta maskinan er frá einaferð miðskeiðis í áttatiárunum, sigur Torbjørn Gaard.

Uppi á loftinum á Seglvirkinum er sølubúð, har teir eitt nú selja selja krókar, sjeklar, ketur, weir, tog og annað.




*Bygningurin, har Seglvirkið framvegis húsast í dag, er bygdur í 1920*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*